## 2,6% vøkstur í Grønlandi

Grønland hevur havt búskaparvøkstur síðani 2004, og tøl, sum grønlendska hagstovan júst hevur almannakunngjørt, vísa, at búskaparligi vøksturin í Grønlandi var 2,6 prosent í 2006 samanborið við árið fyri. Tølini vísa, at tað almenna gjørdi sítt til vøksturin við størri íløgum og størri nýtslu. Í 2006 var grønlendska bruttutjóðarframleiðslan 10,5 mia. krónur. Tað svarar til 187.000 krónur upp á fólkið, sum var 10.000 krónur meiri enn í 2005.



## Danir snýta seg sjálvar

Danski Fólkaflokkurin er so hart ímóti, at grønlendingar fáa ræðisrættin yvir grønlendsku undirgrundini, at flokkurin hevur sett sær fyri at forða fyri, at tað skal henda. Tað seinasta stigið er, at tingmaðurin Kristian Thulesen Dahl fer at royna at steðga teirri ætlaðu sjálvsstýrisavtaluni millum danir og grønlendingar. Kristian Thulesen Dahl sigur við fjølmiðlar, at danir snýta seg sjálvar við at lata grønlendingum undirgrundina.



*Ein av manningini á Sundabergi (Dia) undir liðini á stóra toskinum*

# Toskur vigaði heili 88 pund

**Hetta man vera ein hin størsti toskurin, sum Sundaberg hevur fingið - og bert annað flakið av hesum fiski vigaði út við 15 pund!**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er vorðið alt meira vanligt, at skipsmanningar gera sær heimasíður, har teir kunnu skriva eitt sindur um, hvar teir eru, hvat teir gera og hvussu gongur. Eisini eru hesir menn óførir at taka myndir av skipi, manning, fiski og sjólívinum umborð annars og leggja tær út á heimasíðuna.

Á heimasíðuni hjá flakatrolaranum Sundabergi funnu vit myndina av hesum stóra toskinum, sum teir hava fingið.

- Toskurin er veiddur í russiskum sjógvi. Hann er 158 cm. langur og vigar 88 pund. Eitt flak av hesum fiski vigar 7,45 kilo. Menn vilja vera við, at hetta er størsti toskur, sum veiddur er við Sundabergi. Onkur heldur seg kortini vita um onkran størri, men eingi prógv eru fyri hesum.

Soleiðis skrivar manningin um stóra toskin, sum teir eisini hava avmyndað bæði væl og virðiliga.

Sambært dagbókini á heimasíðuni, skilst, at Sundaberg tíðliga í hesum mánaðinum hevði fingið stívliga 200 tons í flaki.

# Brimil við Grími Kamban



*Brimil er júst komin til lands við ísfiskatrolaranum Grími Kamban, sum noyddist at bróta túrin av, tí eitt rør í maskinrúminum var farið at leka*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Seint í gjárkvøldið bað ísfiskatrolarin Grímur Kamban um sleip, tá ið teir vóru staddir á leiðini í ein landsynning úr Nólsoynni**

SLEIP
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Um hálvgum tíggjutíðina í morgun kom vaktar-og hjálparskipið Brimil á Havnina við ísfiskatrolanum Grími Kamban.

Klokkan nærkaðist midnátt í gjárkvøldið, tá ið Grímur Kamban bað um sleip. Teir vóru tá staddir í ein landsynning úr Føroyum á leiðini við Nólsoyarbanka.

Um 03-tíðina í nátt var Brimil á leiðini og tók ísfiskatrolaran upp á sleip.

Komnir inn í Nólsoyarfjørð í morgun, tók Brimil Grím Kamban uppat skipsíðuni og síðan løgdu skipini at við vestaru bryggju í Havn.

### Rør fór at leka

Á Fiskiveiðieftirlitinum vistu tey ikki í morgun, hvat var áfatt hjá Grími Kamban, men helst hevur skipið havt trupulleikar við motorinum.

Tá ið Sosialurin var á eystari bryggju og avmyndaði skipini stutt eftir, at tey vóru komin til lands í øllum góðum, skiltist á manningini, at eitt rør í maskinrúminum var farið at leka.

# Kommuna stuðlar fiskimonnum

**Í Føroyum skal orðið "studningur" helst ikki takast upp á tungu - í hvussu er ikki, tá ið ræður um vinnuna. Men norðmenn síggja øðrvísi upp á studning enn føroyingar**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á heimasíðuni hjá norska Fiskeribladet verður víst til grein í Finnmarken.no, har kommunustýrið í Nesseby, sum liggur í Finnmørkini, helst fer at játta einum ungum fiskimanni hálva miljón krónur í stuðli til keyp av báti og kvotum.

Kommunustýrið hevur í sínum útgangsstøði sett eina rammu upp á 150.000 krónur til stuðul til ungar menn í kommununi, sum vilja keypa sær bát og kvotur.

Men á fundi í formansskapinum 5. februar varð einmælt samtykt at senda umsóknina hjá unga fiskimanninum víðari til kommunustýrið, tí formansskapurin heldur, at Edgar Olsen eigur at fáa ein enn størri stuðul.

Ráðsmaðurin, Stian Lindgård, sigur, at politiski vælviljin hjá kommununi hevur við unga aldurin hjá Egdari at gera, og hann er samstundis yngsti fiskimaðurin í kommununi.

Edgar Olsen hevur søkt um hálva miljón krónur í stuðli, og sum skilst, er ikki óvist, at kommustýrið fer at ganga umsókn hansara á møti.

*Tað er kalt í havnini í Nesseby í Finnmørkini hesa ársins tíð*

